Lívdin
- í lívd hins hægsta

# PREP-SKEIÐ FYRI HJÚN

## EITT ÓGLOYMANDI VIKUSKIFTI FYRI TYKKUM BÆÐI Á HOTEL NORÐ

Setið vikuskiftið 6.- 8. februar 2009 í kalendaran! Samkoman Lívdin skipar fyri PREP- skeiði, sum er fyri øll, ið vilja fáa íblástur og vegleiðing at samskifta og at liva saman sum hjún. Vit byrja fríggjakvøld við nátturða og enda sunnudag seinnapart. Tit skulu ikki hugsa um matgerð, uppvask, avrudding, arbeiði ella børn. Tit skulu bert hugsa um tykkum sjálv!

Hvør vil ikki gera íløgu í eitt skeið, sum gevur amboð, ið kunnu geva hjúnalagnum 50% størri møguleika at halda? Hvør vil ikki læra um kærleika, lívsvirðir, lívsáskoðanir, samskifti, væntanir, leiklutir, vandaeyðkenni, at handfara ósemjur, vinalag, kynslív, kenslulív, halgan og fyrigeving í hjúnabandinum?

Skeiðið er lætt og stuttligt, og skift verður millum undirvísing, venjingar og hugna. Grundarlagið fyri skeiðnum er bíbilskt, men tað byggir eisini á vísindaligar kanningar við hjúnum gjøgnum 30 ár.

**Tit skulu ikki vera bangin fyri at sita í bólkum og luta innastu kenslur tykkara, tí einki bólkaarbeiði verður.** Tær venjingar, sum verða, verða bert saman við hjúnafelaganum.

**Skeiðið verður á Hotel Norð 6. til 8. februar 2009**
Kostnaður er 3.400 kr fyri parið. Kostnaðurin umfatar gisting við fullum kosti og undirvísingartilfar.

**Undirvísarar:**
Unn og Jógvan Zachariassen
Durita og Pauli Djurholm

**Pláss er fyri 13 pørum!**

**Tilmelding**
Tilmelding fer fram hjá Paula og Duritu Djurholm á telduposti prep@livdin.fo ella tlf 316099. Depositum á 1.000 kr verður goldið við tilmelding og restin seinast 14 dagar undan skeiðnum á konto 9181 1615515. Peningurin verður ikki endurgoldin, men tit kunnu sjálvandi bjóða øðrum pari tykkara pláss, um tit fáa forfall.